## DAGSINS MEINING

# Brúkaragjald á landsvegum?

Tað hevur í nógv ár verið ein borgarligur tvangstanki, at vegaíløgur hjá landinum skulu loysa seg rakstrarbúskaparliga. Hesin tankin er blóðskeivur, tí infrastrukturur er ikki bert um handil og vinnu. Tað snýr seg eisini um eina tænastu til einstaka borgaran, og síðst, men avgjørt ikki minst, um trygd.

Man hevur aðrastaðni gjørt partafeløg, ið skulu eiga og reka tunnlar og brúgvar, men misjavnt er, hvussu gingist hevur við hesum.

Í Føroyum eiga vit at hava eina prinsipiella diskussión um vit yvirhøvur vilja hava landsvegastubbar við brúkaragjaldi. Hetta er øgvuliga prinsipielt, tí um fólk skulu gjalda brúkaragjald fyri at koma ígjøgnum ein tunnil til Vágarnar, hví skal man so kunna koyra yvirum brúnna við Streymin fyri einki? Skulu allir tunlar framyvir fíggjast við brúkaragjaldi?

Hvussu so víkir og vendir, so er tað landið, ið stendur við endan. So er spurningurin, um fólk vilja hava eitt alment felag, ið lítið annað skal gera enn at krevja fyri billettir. Kann vera, at onkur heldur hetta vera eitt gott hugskot í dag. Hvussu verður um 10 ár? Her eiga vit aftur at hava brúnna um Streymin í huganum. Eingin kundi ímyndað sær, at man skuldi steðgað við ein bumm og betalt við eina lúku fyri at koyra av Streymoynni á Eysturoynna. Hví skal tað verða øðrvísi, tá man skal av Streymoynni í Vágoynna, ella av Eysturoynni til Norðoyggjar? Landið og harvið skattgjaldarin eiga og gjalda tunlarnar so ella so. Við brúkaragjaldi verða tað so teir skattgjaldarar, ið ferðast yvir flogvøllin og til Vágarnar, ið koma at taka ein eitt sindur størri part, men hví skulu teir tað, tá allir aðrir landsvegastubbar verða fíggjaðir yvir skattin? Hvat fer skatturin til, um hann ikki kann gjalda fyri vegir longur?

Um brúkaragjald skal verða normurin hereftir, so má man verða konsekventur, og tað ynskja føroyingar neyvan. Spurningurin er, um man ikki bert burdi avtikið P/F Vágatunnilin, tá tunnilin er liðugur, og handað Landsverkfrøðinginum tunnilin at umsita, eins og hesir umsita allar aðrar tunlar í landinum. Føroyingar eru vanir at koyra millum oyggjar fyri einki. At stovna eitt eyka alment felag, ið, um man trekkir spilltíðsskapandi innkrevjingarfunktiónina frá, bert skal gera tað sum Landsverkfrøðingurin ger frammanundan, tykist ørskapur, serliga í hesum tíðum, har man tosar um ein ov stóran almennan sektor.

Allir føroyingar áttu at koyrt ein túr tvørturum Streymin og steðgað á, og hugsað um billetlúkur og gjald er nakað, sum føroyingar vilja hava á sínum landsvegum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvat bagir nú fólkafloksmonnum?

**Hergeir Nielsen**

Stórt hóvasták verður gjørt burturúr, at formaðurin í uttanlandsnevndini hevur borið fram skeiv tíðindi fyri fjølmiðlunum.

Soleiðis er ikki, og niðanfyri er prenta avrit av mínum tíðindum, sum greidliga lýsir, hvat fráboðað varð.

»Uttanlandsnevndin er vorðin samd um ikki at viðmæla, at løgmaður gevur NATO boð um at fara undir hesa ætlan sína, og nevndin hevur sent løgmanni eitt skriv, har sagt verður frá, at:

Vísandi til hernaðarsamtyktirnar, sum eru gjørdar í tinginum, er nevndin samd um, at hon fer ikki at siga sína hugsan um málið, fyrr enn eftir at eitt aðalorðaskifti hevur verið um framtíðarstøðu Føroya á verjupolitiska økinum.

Hildið verður, at tástani hevur uttanlandsnevndin fingið eitt haldgott grundarlag at halda seg til, áðrenn hon setur sær føri fyri at ráðgeva løgmanni í hesum máli.«

Væl og virðiliga er grundgivið, hví uttanlandsnevndin ikki gevur nakað viðmælið, og væl og virðiliga verður tikið uppaftur til seinast í sama skrivi, at:

»Ein samd nevnd heldur, at vit eiga at geva okkum ta tíð, ið rímilig er til eitt so stórt og avgerandi mál sum framtíðarstøðu Føroya á trygdarpolitiska økinum er.

Semja er um, at Føroya Løgting tekur hetta álvarsmál til umrøðu fyrst, og síðani setur uttanlandsnevnd løgtingsins seg aftur at viðgera málið, áðrenn hon fer at ráðføra seg við løgmann um hansara leiklut í hesum samanhangi.«

Hóast hesi 100% korrektu tíðindi og klokkukláru talu, so fer Jógvan við Keldu í útvarpið, tekur eina orðing burturúr sínum samanhangi, og sigur meg hava sagt ósatt.

Eg vænti at Jógvan við Keldu er so frægur maður, at hann umhugsar skuldsetingar sínar, og fær tær út av verðini.

# Kalda kríggi í samgonguni

**Katrin Dahl Jakobsen**
*løgtingskvinna*

Uttanlandsnevndin hevur fingið slíkt skot fyri bógvin av óseriøsa tíðindaskrivinum og samrøðuni, sum Hergeir Nielsen hevði við Útvarpið viðvíkjandi Natoverkætlanini á Eiði, at ringt verður at sessast aftur við fundarborðið við honum sum formanni. Tí hvussu kunnu vit líta á ein formann í eini nevnd, sum ikki er førur fyri at bera fram niðurstøðurnar rætt, sum nevndin er komin til?

### Løgmaður bíðar

Tað var ein samd Uttanlandsnevnd, sum fór av fundi týsdagin í farnu viku. Nevndin helt, at løgmaður skuldi bíða við síni støðutakan mótvegis ríkismyndugleikunum, til Løgtingið hevur havt eitt aðalorðaskifti um verjustøðu Føroya. Hvør fólkaskúlanæmingur hevði megnað at borið hesi boð víðari. Her varð hvørki mælt frá ella til! Einki partapolitiskt kegl, men heldur ein vilji til framyvir at finna felags stev, havandi í huga áður viðtiknar hernaðarsamtyktir.

### Særdir nevndarlimir

Men ikki kundi hann bara sær, formaðurin. Hevur helst innantanna sitið og meddað í nevndarrúgvuna við síni altíð kláru tjóðveldisløðing, meðan vit umrøddu málið í tí álvara tað krevur. Eru Føroyar ikki útgjørdar til krígsførslu, ver vís í, at Uttanlandsnevndarformaðurin er. Sum so ein høskilig nevnd fyri slíkar fjepparar. Og skotið varð so beint í rúgvuna við hesum tíðindaskrivi og samrøðu, sum eingin kendist við. Tað sveið. So mikið dygt, at flestu nevndarlimir kendu seg leggja eftirá, um somu tíð, sum telefonirnar sínámillum kimaðu seg hásar.

### Ákoyringar á nevndina

Hergeir Nielsensa privata niðurstøða er, at nevndin ikki viðmælir, at løgmaður gevur Nato boð um at fara undir hesa verkætlan, umframt allar hansara partapolitisku klíningar, sum hann dúgliga smyr uppá. So naivar, at ikki er vert at taka upp aftur. Og hetta vantar hann, at nevndin góðtekur. Tá hon ikki ger tað, ákærir hann nevndarlimirnar fyri at hava fingið kaldar føtur, nú Fogh hevur verið her. Sjúkligt!

### Einaferð formaður, altíð formaður

Er tað nakar, sum hevur fingið fótakulda, so er tað formaðurin sjálvur. Soleiðis skilti eg tað, tá Jógvan við Keldu var so heppin, at hann fekk sagt sína hugsan við Útvarpið hósdagin. Hann helt, at »formaðurin hekk í einum klønum tráði«. Men at skifta formannin út, nei tað bar ikki til. Nú er man partur av eini samgongu og tað skal nógv til og alt hatta har…

So Hergeir Nielsen kann tryggur løða av nýggjum, so mikið styrktur, sum tráðurin nú gjørdist.

Líknandi mál var jú eisini í seinastu tingsetu við sama formanni og sama roki.

### Action í trúnaði

Og hetta er spælið. Tá ein tíð er fráliðin, so hava samgongulimir einki sagt, einki sæð og einki hoyrt. Sicilienskir tilstandir. Allir vita, at í hvørjum leirinum eru fleiri, sum eru farnir so mikið upp í límingini, at gera tit hatta, so gera vit hitt, tí annars missa vit valdið.( løgmaður, Jørgin, Tobbi osv. Signar á Brúnni varð ekspederaður av hansara egnu í besta Corleone stíli. Eingin visti hví). So hóast kalda kríggið er av, so herjar tað javnt og samt inni í sjálvari samgonguni. Action í trúnaði, líkasum.

### Samgongan fram um sannleikan

So eg kann bara siga meg so sára samda við Kjartani Hoydal, tá eg las røðuna hjá honum í blaðnum, sum hann helt Hinaferð á Doktaragrund, at tá partapolitikkur, stakmál og persónar eru fremst í øllum lutum, kann vera ilt at leggja kósina frameftir. Tað er júst tað, sum dálkaði og órógvaði hetta málið. Heldur enn at vera talsmaður fyri samda nevnd, fór Hergeir Nielsen í sín partapolitiska búna. Heldur enn at seta sær fyri sum politiskt vørumerki at vera sannur, hevur samgongan sett sær fyri at verja persónar. Samgongan fram um sannleikan.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro heri@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktiónin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Grát mítt elskaða land!

**Eru vit komin á botn í moralska og etiska forfallinum hjá hesi landsstýrissamgongu, har alt verður ofrað fyri maktina, í annars eini púrasta hugsjónarleysari heimastýrissamgongu?**

**Johan Samuelsen**

Allir føroyingar hava verið vitni til ein politiskan leik fyri opnum leiktjøldum seinasta mánaðin, sum av røttum órógvar okkum almikið. Virðingin fyri okkara fólkavaldu politikkara um er ikki tann sama í dag, sum bert fyri fáum vikum síðani. Vit hava bæði sæð og hoyrt, hvussu logið verður fyri opnari mikrofon, hvussu tjóvalyndi valdar í Tinganesi, hvussu menn sum ikki duga at gera mun á eins egna og annara dusa sær í landsins fremstu "álitissessum", sum øll hampa fólk her á landi halda vera so púrasta ósambærlig við alla virðiliga mannahugsan. Hvussu langt kann ein fara, tá tað snýr seg um brot á so grundleggjandi greinir í skrivaðu og óskrivaðu lógum okkara? Og ringast av øllum er, hvussu tignin um løgmansembætið verður niðurbrotin, fyrst og fremst av løgmanni sjálvum, ikki fyri tí sum hendi í Norðdepli fyri 20 árum síðani, men heldur har hann fleiri ferðir sigur ósatt fyri opnari mikrofon um fyrningarfreistina, fráboðanina av henni o.s.fr., uttan hetta fær avleiðingar fyri tey sum vara av okkara parlamentarisku skipan – her dugir als ikki at fara oman í dómkirkjuna ólavsøkudag í føroyskum klæðum og spæla góður og álitisvekjandi, tá ein og hvør føroyingur veit, at fals býr undir fríðum skinni, og onkur er bankaður uppá pláss eitt korter undan kirkjugongd av øðrum, sum fyri einhvønn prís vilja bjarga sær ein landsstýris- ella løgtingssess!

Eitt er, at løgmansfylgið er heldur lagghallað, men verri er, at politiska skipan okkara, sum vird demokratisk tjóð í altjóðasamfelagnum er komin í álvarsaman vanda, men eftir øllum at døma, so kennir maktgirndin hjá øllum flokkum í samgonguni ongi mørk – flokkarnir hálsfevnast í villastu maktgirnd, frá høgru til vinstru! Tey ungu og vællærdu innan samfelagsfrøðina, sum vita, at her er farið út um alt mark, látast ikki um vón, sita kúrr og bína, og vilja fyri alt í verðini ikki frásiga sær møguleikan um ein feitan nevndarsess her ella ein góðan válgarbita har – og velja tí at tiga, og er hetta stórt spell fyri demokratisku skipan okkara – her er lítil fakligur stoltleiki at hóma hjá okkara intellektuella og vælútbúna unga fólki – og hvør uttan tey skuldu staðið í fremstu røð at vart fólkaræðiskipan okkara? Men eisini tey velja at tiga, og hugsa heldur um komandi gloypibitan í onkrum ráði ella stýri! Hvar er bitri brandur ungdómsins, ella verður bert hugsað um "villa, vovse og Volvo"?? . Og hann sum vit væntaðu fór at standa sum verji móti rotinskapinum innan tinggátt, hann bakkaði eisini, tá á stóð! Og allur stórorðaði retorikkurin er onki annað enn sum Shakespeare segði á sinni: words, words, words. Maðurin er raskastur omanfyri hálsvølin, alt sum kemur frá hasum "fýrinum" frá nú av, verður at rokna sum vátt leysakrút, meiri er ikki um hann at siga. Og við hjálp frá Anfinni og Jørgini hevur Tobbi megnað, uttan hjálp aðrastaðni frá, at útrópt okkara land til eina sjálvgjørda bananrepublikk, tað bleiv so tað nærmasta Tobbi kom republikkini! Fremsta uppgávan hjá Høgna Hoydal, floksformanni, hevur í seinastuni verið at biðið umskylda – ein løgin uppgáva at hava hjá einum (nógv viknaðum?) formanni.

Eisini varð løgmaður bakkaður upp av teimum, sum siga seg at byggja á kristnu grundsjónarmiðini - royndt verður at læra hvørt skúlabarn "Tú mást ikki stjala", men Jenis og Bill eru hevjaðir langt upp um Móses og profetarnar

At hjálpa Óla Breckman at verja løgmann, hvussu "fantastiskur" hann er, so loypa teir báðir til, Føroya samfelagsrevsari nr. 1 gjøgnum fleiri ár, Jóanes Nielsen, og honum sjølkandi á baki Vagnur Michelsen, at henda samgongan hon man vera longst sum best, tí løgmaður er so "fittur", og fólk eru so evindiliga troytt at hoyra um hesi viðurskifti, sambært Vagni! Hvør skuldi trú tí, at hesir tríggir garparnir endaðu sum felags verjar fyri svartasta afturhaldi og óreglusemi í nýggjari føroyskari søgu!? Onkuntíð bardist tjóðveldisflokkurin fyri rættvísiskrøvum fiskimanna og ímóti "smákoruption í stórum stíli" í Tórshavnar býráð – ein flokkur á vinstra vonginum sum virðing stóð um. Nú er hann vorðin eitt akademiskt, intellektuelt samanrenn, sum hevur eittans endamál: at halda fast við valdið. Ei undur í, at tjóðveldisflokk spyrja, var hetta endamálið við fullveldisøsingini? Illa fór flokkur Erlends.

Enn sum áður, sannleikin er illa lýddur. Og so fer Vagnur so langt sum at harmast tíðindaflutningin um Tobbamálið. Tað er júst tvørturímóti, fyri einaferð skyld lívdi SvF og ÚF upp til teirra skyldu sum kritiska, demokratiska røddin í fjórðu statsmaktini, og vóru tað serliga teir báðir, Øssur Winthereig og Helgi Jacobsen sum stóðu sum klettar – tøkk fyri tað báðir – vit fáa, tíverri, ikki gingið fyri "mikrofonhaldarum" í tíðindaverð okkara, men tað er onki at siga til, tá vit hoyra, hvussu løgmálaráðharrin, ið vera skal, finnur uppá ferð eftir ferð at ringja til Jústines L: Eidesgaard, tíðindastjóra á Sosialinum, og blandar seg uppí, hvat skal koma í blaðið og ikki – óhoyrt fyri ein hvønn løgmálaráðharra á okkara leiðum – hetta er í besta kommunistiska stíli, og er tað hetta vit kunnu vænta okkum í einum fullveldis Føroyum? Og so hann sjálvur løgmaður, sum beinleiðis fer í telefonina og hóttir frælsi í SvF at leggja eina óhefta, redaktionella linju, sum er fremsta skylda tíðindafólksins – hetta skulu eitast at vera garantarnir í demokratisku skipan okkara, løgmaður er enntá verri pressurnar, sum leggja á tíðindastovnarnar, sum m.a. júst hava hesa skyldu at vísa á, at rot er komið í samfelagsskipan okkara – men málið varð meistarliga snarað frá fólkafloksins frá kjarnuni í málinum um stuldur, yvir til tignina (!!) um løgmansembætið - ikki eitt orð um sjálvt málið, at Anfinn og Jørgen ikki duga at skilja millum sítt egna og annara, og tí koyrir alt saman víðari, sum um onki var hent. At hugsa sær til, at Tony Blair t.d. hevði ringt til BBC og klagað um tíðindaflutningin – hann hevði rokið sama dagin sum forsætisráðharri, men her ber alt til

Vit hava tolt fleiri búskaparkreppur, og eru tíbetur komin undan kavi aftur hvørja ferð – henda kreppan er av politiskum, moralskum og etiskum slagi, sum vit koma at dragast við í fleiri ár framyvir, og fer hon at kasta myrk skýggj yvir føroyska politiska landslagið, tí álvarslig svartaspilla hevur sníkt seg inn í sjálva skipanina, og moralska kreppan kann ikki loysast við vøkrum fíggjartølum, men kann bert verða bjargað, um politiskur stírðil er í monnum – løgmaður átti at vita, at størsti sigur ein kann vinna, er á sjálvum sær, men, tíverri, aftur her vann maktgirndin!

Muran er ring í samgonguni – gott tað sama, at Jóanes Eidesgaard ikki skal vera við at skumpa henda ótespiliga køstin komandi árini.

Eg sum helt, at eg lívdi í einum demokratii, má nú ásanna, at rætta orðið er eitt kleptokrati (tjóvaveldi)!

Grát mítt elskaða land.

Harald Dirks í Lítluvík:

# Málar eftir minninum

**Danin Harald Dirks letur mánadagin upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hann hevur búð í Føroyum í tvey ár fyri 40 árum síðani**

LIST
*Ingrid Bjarnastein*

Smiðjan í Lítluvík verður frá mánadegnum 26. august til 29. august karmur um framsýning av akvarellmálningum hjá Harald Dirks.

– Málningarnir eru royndir hjá mær at vísa, hvussu eg síggi oyggjarnar, sigur Harald Dirks.

– Við á framsýningini havi eg eisini nakrar fáar málningar úr Danmark og Noregi, men er hetta mest fyri at fáa samanberingina millum londini fram.

Harald Dirks búði í Føroyum frá 1962 – 64. Hann varð øgvuliga hugtikin av oyggjunum, og tá tók hann nógv biløt og skitseraði nógv. Men hetta varð lagt á hyllina tá hann kom aftur til Danmarkar.

– Nú kom eg so aftur at vitja, og tá tók eg aftur pensilin í hond. Næstan allir málningarnir eru málaðir í Danmark, men eg máli teir soleiðis, sum eg minnist teir í høvdinum.

Listamálarin vísir á, at sjálvt um hann brúkar akvarell, so roynir hann at fáa eina oljumálingsdygd burturúr málningunum. Pappírið hann hevur nýtt er fint pappír, sum hóskar seg væl til akvarell máling.

– Tá eg byrji upp á ein málning, veit eg ongantíð hvørjum tað endar við. Sjálvsagt havi eg eina mynd í høvdinum, og havi eina hugsan um, hvussu tað sær út, men tað kann væl vera, at tað, sum eg ætlaði skuldi verða ein vetrarmálningur verður til ein vármálning.

Framsýningin hjá Harald Dirks letur upp mánadagin 26. august og lýkur hósdagin 29. august. Állar dagar er opið frá klokkan 14 – 20.



*Listamaðurin Harald Dirks letur mánadagin upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hann málar akvarell málningar av náttúruni í Føroyum. Eisini hevur hann nakrar málningar við úr Noregi og Danmark*

*Mynd: Finnur Justinussen*